# Pílagrímsferð við Elisabeth Lidell 26.-27. sept. 2009.

Pílagrímsferðin byrjar frá Nes kirkju leygardagin 26. sept. kl. 10.00. Gingið verður til Æðuvíkar og víðari til Rituvíkar.

Í Rituvík verður steðgur og vit eta matpakka. Hildið verður áfram til gongu til Lamba har vit aftur steðga á. Dagurin endar í Syðrugøtu við einum døgurða.

Sunnumorgun vitja vit Blásastovu áðrenn vit fara í Gøtu kirkju.

Aftaná kirkjugongdina gongur leiðin til Varmakeldu har vit gera ein steðg og eta matpakka. Síðan halda vit áfram og ferðin endar við pílagrímsandakt í Fuglafjarða kirkju sunnudagin

Á ferðini steðga vit av og á og pílagrímsprresturin Elisabeth Lidell setur fokus á lívið sum eina pílagrímsferð.

Kostnaður fyri hvønn ........................ kr. 1.850,-

Íroknað prísin er:

- ferðaleiðari
- matpakkar
- døgurði við dessert
- drykkivørur og kaffi
- gisting í Syðrugøtu
- morgunmatur
- bussur frá Fuglafirði til Nes kirkju

**Tilmelding á 62ºN telefon 340060 ella teldupost incoming@62n.fo innan 12. september.**





62°N

brúkið 62°N travel...
vit eru serfrøðingarnir!



SPEKT | løggildir grannskoðarar

# SPEKT søkir grannskoðarar

Søkt verður eftir grannskoðarum at byrja skjótast gjørligt og í seinasta lagi 1. desember 2009.

## Starvslýsing

Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

## Umsøkjarin

Vit hava brúk fyri:

- fólki við royndum og/ella ástøðiligari útbúgving innan grannskoðan/bókhald,
- fólki við hægri handilsskúlaprógvi

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi.

## Útbúgvingin

Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum tað dagliga arbeiðið, kunnu tey, sum verða sett í starv, nema sær víðari ástøðiliga útbúgving. Herumframt verður talan um innanhýsis útbúgving.

## Framtíðarmøguleikar

Møguleiki er fyri at nema sær tær praktisku og ástøðiligu royndirnar, sum skulu til fyri at gerast statsautoriseraður og/ella løggildur grannskoðari.

## Umsóknin

Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi innan 1. september 2009.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:
Mirjam Haraldsen tel 233470,
Finnbjørn Zachariasen tel 233475
ella Árna Ellefsen tel 233484.

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# Stuðul úr Jólamerkjagrunninum



Sambært viðtøkunum hevur grunnurin til endamáls at býta út ágóðan av søluni av jólamerkjum, ið Posta gevur út á hvørjum ári. Ágóðin verður býttur út til frama fyri børn og ung til stovnar og feløg.

Grunnurin stuðlar størri samfelagsgagnligum verkætlanum fyri børn og ung.

Eitt trímannastýri hevur um hendi leiðslu grunsins og ger av, hvussu ágóðin verður býttur.

Stýrið er ikki bundið av, at umsókn er send, men umsóknir um stuðul úr Jólamerkjagrunninum í ár kunnu sendast grunninum í seinasta lagi 1. sept. 2009 og skulu stílast:

**Jólamerkjagrunnurin**
**Postsmoga 3009**
**110 Tórshavn**

Posta